# Landsnevndarfundur

Fundur nr.: 1010

Stað: Hotel Skálavík　　　Dagfesting: 17-11-2018

| Navn: | Tlf: | Mail: | Init | Uppmøtt: |
|---|---|---|---|---|
| Jóna Venned | 218332 | jonavenned@gmail.com | JV | X |
| Henry Toftegaard | 262225 | henry69ftw@hotmail.com | HT | X |
| Olga Arnfinnsdóttir | 261770 | olga.arnfinnsdottir@gmail.com | OA | |
| Sóley Mikkelsen | 586292 | soleymikk@hotmail.com | SM | X |
| Palma Karstinsdóttir | 229974 | palma_k@hotmail.com | PK | |
| Tórarin N. á Rípuni | 421505 | | TR | |
| Rúni Christiansen | 214765 | ina.runi@gmail.com | RC | X |
| Bárður Johannesen | 218517 | bardur.johannesen97@hotmail.com | BJ | X |

## Landsnevndarfundur　　　klokkan: 18.00

## Skráin:

*- Gera klárt til eykalandsfund*

*- At arbeiða við framyvir*

*- Fíggjarætlan fyri Samskipanina*

*- Fíggjarætlan fyri Skótadepilin á Selatrað*

Gera klárt til eykalandsfund

Lagt verður fram at uppskot skal gerast, so at KFUK skótaleiðarar í bólkum sum eru bæði KFUM og K, skulu kunna atkvøða fyri KFUM skótabólkin um einki KFUM skóta umboð er.

Síðani verður arbeitt við at gera eitt uppskot uppá hvussu Selatraðsnevndin skal orðast í viðtøkunum. Við input frá øllum uppmøttu so kom hetta uppskoti, ið verður lagt fram á eykalandsfundinum.

2 Arbeiðsbólkar

- 1. Landsnevndin kann eftir tørvi seta arbeiðsbólkar og ásetur arbeiðsøkið teirra.
- 2. Selatraðsnevnd
    1. Í Selatraðsnevndini sita 5 limir, harav ein teirra er úr Landsnevndini. Nevndin skipar seg við formanni og skrivara.
    2. Selatraðsnevndin umsitur alt vanligt viðlíkahald av depilinum (t.e. syrgja fyri, at depilin er klárur til nýtslu av skótabólkum o.t.). Eisini hevur hon skyldu til at fyriskipa arbeiðsvikuskiftir o.t., sum fara fram á depilinum, og at seta mennandi verkætlanir í gongd.
    3. Selatraðsnevndin skal gera eina fíggjarætlan, ið skal leggjast fram á landsfundi og eykalandsfundi.
    4. Selatraðsnevndin kann søkja um fígging til verætlanir, sum skulu vera góðkendar av landsnevndini.
    5. Fundarfrásøgn verður skrivað fyri hvønn fund og send limunum í landsnevndini.
    6. Val av limum til Selatraðsnevndina er á hvørjum landsfundi. Nevndin situr í 2 ár í senn.

Eisini var tosa um hvussu vit skulu handla við tí árliga gjaldinum til Selatrað. Hetta var stilla upp í 1998 og skuldi í mesta lagi vara 15 ár fram, sum er 2013. Landsnevndin kom til tað niðurstøðu at leggja fram á eykalandsfundið at lata gjaldið forseta og av tí sama taka burtur stk. 6.

26 Árligt gjald til Skótadepilin á Selatrað

1. Álagt verður øllum bólkum eitt árligt gjald til Skótadepilin á Selatrað á kr. 4.500,-.
2. Upphæddin skal flytast á konto hjá samskipanini í seinasta lagi 1. Apríl. Uppkrav verður sent bólkunum í mars mánaða.
3. Peningurin er oyramerktur til at rinda lán aftur í peningastovnunum og kann ikki nýtast til rakstur.
4. Bólkarnir kunnu hava upp til 3 tiltøk um árið á Selatrað, uttan at gjalda meira.
5. Landsnevndin kann, eftir umsókn, gera aðrar avtalur við bólkar.
6. Samtykt er á landsfundinum 1998, at henda viðtøka er galdandi til verandi lán eru niðurgoldin, tó í mesta lagi um 15 ár.

Tað sum er merkt við grønum verður lagt afturat, og tað sum er merkt við reyðum skal beinast burtur.

Tær fullu viðtøkurnar og grundlógin kann síggjast á heimasíðuni "skoti.fo" undir knøttinum "Um okkum"

**At arbeiða við framyvir**

Tosa var um hvat landsnevndin skal koma at arbeiða við framyvir, og fleiri uppskot komu fram. Hetta var tað ið var valt at fokusera á:

| | |
|---|---|
| Instruktørskeið | SM, BJ og PK |
| Leiðararekrutering | JV og HT |
| Marknaðarføring | SM |
| Dugnatekin | RC og TÁR |

**Fíggjarætlan fyri Samskipanina**

Á fundinum var sett upp ein mett fíggjarætlan fyri samskipanina:

| **Inntøkur** | |
|---|---|
| Limagjald | kr. 56,000 |
| Stuðul FSR og FUR | kr. 500,000 |
| **Inntøkur tilsamans** | **kr. 556,000** |

| **Útreiðslur** | |
|---|---|
| Telefon og wifi | kr. 14,400 |
| Skrivstovuhald | kr. 20,000 |
| Limagjald | kr. 700 |
| Bókhald/grannskoðan | kr. 16,000 |
| Lønir | kr. 138,000 |
| Gjalda skuld av limagjaldi til bólkar | kr. 120,000 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **kr. 309,100** |
| **Úrslit** | **kr. 246,900** |

**Fíggjarætlan fyri Samskipanina**

Á fundinum var sett upp ein mett fíggjarætlan fyri skótadepilin á Selatrað:

| **Inntøkur** | |
|---|---|
| Gjald frá bólkum | kr. 45,000 |
| Selatrað virksemi og útleigan | kr. 720,000 |
| **Inntøkur tilsamans** | **kr. 765,000** |

| **Útreiðslur** | |
|---|---|
| El | kr. 40,000 |
| Olja | kr. 35,000 |
| Gass | kr. 6,000 |
| Viðlíkahald | kr. 180,000 |
| Lendisleiga | kr. 8,000 |
| Tryggingar | kr. 13,000 |
| Renovatión | kr. 10,000 |
| Lán | kr. 95,000 |
| Lønir til instr. | kr. 300,000 |
| Tilfar til virksemi | kr. 50,000 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **kr. 737,000** |
| **Úrslit** | **kr. 28,000** |

**Fundur lokin:** **Kl. 20.00**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Næsti fundur: | 17.11.2018 | Skrivari: | BJ |

---

**Jóna Venned**

**Rúni Christiansen**

**Henry Toftegaard**

**Sóley Mikkelsen**